# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800




## Bilradio á Rás2

Bilradio verður sent týsdag millum kl. 16 og 17, og endursent fríggjadag millum kl. 8 og 9, og leygardag kl. 17

# Kuga – smartur SUV frá Ford

**Ford í Evropa hava rættuliga vind í seglunum í løtuni við nógvum nýggjheitum sum t.d. Mondeo, sum kom fyri kortum, og nýggir Ford Ka og Fiesta koma seinni í ár. Nýggjasti Ford er Kuga, sum er ein væl útgjørdur SUV**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

So gott sum allar bilverksmiðjurnar hava nú ein SUV (Sport Utility Vehicle) í somu stødd sum Ford Kuga. Bara í ár eru fleiri komnir og aðrir eru á veg, vit kunnu t.d. nevna VW Tiguan, sum kom fyrr í ár, og Volvo XC60 og Renault Koleos sum koma seinni í ár.

Ford Kuga, sum fyrstu ferð varð sýndur fram sum konseptbilur á Frankfurt Motor Show í 2007, er júst nú komin á marknaðin. Talan er um ein SUV í eini sera "populerari" stødd, og kappingarneytarnir eru nógvir

Kuga er bygdur yvir sama plattform sum Ford Focus og C-Max. Innan líkist Kuga nakað C-Max, men Kuga er meira sportligur við meira alulook panelum og sportsetrum. Hvat útgerð viðvíkur fæst Kuga í útgávunum Trend og Titanium, og hann fæst bæði sum FWD (Front Wheel Drive) og sum AWD (All Wheel Drive).

Motorurin er ein 2,0 diesel við 136 hk, og 6-trins girkassin er standard.

Ford Kuga líkist burturúr øðrum SUV í hesum klassanum við nokk so sermerktum designi, sum er bæði smart og tíðarhóskandi. Talan er um ein sera rúmligan bil, sum t.d. er væl egnaður til barnafamiljur.

Vit royndarkoyrdu Kuga í Titanium AWD útgávuni. Ein væl koyrandi og væl útgjørdur SUV við sera góðum plássi og er lættur at koyra og at umgangast í ferðsluni.

Ford Kuga kann síggjast og roynast hjá P/F Wenzel í Akranesgøtu. Prísirnir byrja við 329.900 krónum.




*Ford Kuga við 2,0 TDCi dieselmotori og 136 hk. Bygdur í sama stíli sum eyðkennir nýggju Fordarnar*



*Kuga er ein SUV við sermertum og tíðarhóskandi designi*



*Baklúkan er í tveimum, soleiðis at ovari parturin kann latast upp fyri seg*



*Flúgvaraborð við baksetrini*



*Innan er Kuga er sportligur við t.d. alulook panelum og sportsetrum*

## FAKTA

**Ford Kuga 2.0 TDCi AWD**

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2,0 litra TDCi diesel við 136 hk |
| 0-100 km/t | 10,5 sek |
| Botntrekk | 320 Nm við 2.000 snún/min |
| Útlát | 169 g/km |
| Oljunýtsla | 15,6 km/l (blandað koyring) |

StøDD og vekt

| | |
|---|---|
| Longd | 443,0 m |
| Breidd | 184,0 m |
| Hædd | 171,0 m |
| Eginvekt | 1.613 kg |
| Viðførisrúm | 410 litrar |
| Prísur | kr. 404.900,- (Titanium AWD) |
| Søluumboð | P/F Wenzel<br>Akranesgøta 5<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 354500<br>www.wenzel.fo |